# Neyðloysnin gjørdist listarverk

**Tá handverkarar vóru í ferð við at umvæla forhøllina á Hotel Hafnia, komu teir brádliga fram á ein veggjamálning hjá Williami Smith**

VEGGJAMÁLNINGUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Málningurin, sum nú hevur funnið fram til dagsins ljós aftur, er partur av hesum sjáldsomu føroysku veggjamálningunum, og er ein mynd av Trøllkonufingri*

William Smith var at kalla húslistamaðurin á Hotel Hafnia. Ein stórur málningur av einum víkingaskipið hongur í Lobbyini, og er íblásturin til henda málning helst fingin úr navninum Hafnia og tí eyðkenda búmerkinum. Hesin málningur hevur hingið á Hotel Hafnia í meira enn 50 ár, men síðsta vár bleiv hann reinsaður og fluttur, so hann nú reiðiliga kemur til sín rætt.

## Fleiri kend motiv

Uppi í matstovuni hevur William Smith málað beinleiðis á báðar endaveggirnar.

Hetta eru ymisk kend motiv úr Føroyum so sum Hoyvíkshólmur, Vágseiði og Tindhólmur, umframt tvey Føroyakort. Tann málningurin, sum nú hevur funnið fram til dagsins ljós aftur, er partur av hesum sjáldsomu føroysku veggjamálningunum, og er ein mynd av Trøllkonufingri, sum er málað rundan um hurðina inn í matstovuna.

Hóast tann umfatandi umvælingin av kømurunum og Høllini ikki er liðug enn, er restaurant Hafnia uppafturlatin aftaná umvælingina, og tað ber nú til at síggja hendan gloymda William Smith, sum er komin aftur til heiður og æru.

## Goymdur - ikki gloymdur

Av Hafnia siga tey, at av verandi starvsfólkunum er eingin, sum minnist nakað um málningin. Men tað merkir tó ikki, at eingin veit um hetta.

Johan M. Restorff, sum jú í mong ár var ein ímyndunum av Hotel Hafnia, sigur William Smith og Christian Dahl-Restorff voru sera góðir vinmenn. Tí var Christian eisini millum teirra, sum hjálptu til, tá hotellið í 1951 fekk ein „umgang".

–Tá málingaarbeiðið í matstovuhæddini kom fyri, var ætlanin at tapetsera partar av veggunum við serligum, dygdargóðum tapeti. Hetta varð umbiðið úr Danmark, sigur Johan.

– Men tá Tjaldrið kom, var tapetið ikki við. Tíðarætlanin skuldi haldast, og 2 vikur fóru at ganga, áðrenn næsta lastin kom. Christian, sum ikki var av tolnastu monnum, varð ikki glaður um støðuna, men William gjørdist ikki mótleysur og segði brosandi »Hettar ordna okur«

– Og sum sagt, so gjørt. William keypti nøkur føroysk myndapostkort hjá H.N. Jacobsen, og eftir at hava blandað sær nakrar litir saman, var bara eftir at mála.

Johan sigur víðari, at tá enn ein umvæling av matstovuni stóð fyri framman, skuldi ein nýggj forstova gerast móti matstovuni.

– Vit hildu tað vera synd, um vit tá skuldu mála oman yvir vøkru listina hjá Williami. Tí varð ístaðin gjørdu ein eyka veggur oman yvir hesa, soleiðis at málningurin framvegis var at finna, um hugur skuldi vera til tess. Og hjá okkum er hugaligt at staðfesta, at hesir vøkru málningar nú aftur koma til sín rætt, sigur John M. Restorff at enda.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 2 2006

# ECB hækkaði ikki rentuna

MARKNAÐARRÁK

Evropiski miðbankin, ECB, hevði rentufund hósdagin 12. januar. Sum væntað hækkaðu tey ikki rentuna, av tí at bæði búskaparvøksturin og prísvøksturin, í søguligum høpi, eru á lágum stigi. Eftir fundin segði ECB-formaðurin Trichet, at tað gongur betur við búskaparvøkstrinum, og at vandin fyri øktum prísvøksturin ikki er av. Orð Trichets vóru eisini tulkaði sum at hann er minni bangin um prísvøksturin enn áður. At renturnar lækkaðu eftir tíðindafundin ber boð um, at marknaðurin hevur lagt dent á hetta. Tað ber boð um, at íleggjarar ynskja at keypa lánsbrøv hóast rentan er lág. Tí kunnu lánsbrævarenturnar lækka meira. Ein komandi lækking er tó ávmarkað.

## Renturnar ota seg niðureftir

Fyrstu dagarnar av farnu viku hækkaði 10-ára danska rentan eitt vet, meðan hon lækkað nakað aftur eftir tíðindafundin hjá ECB. Samanumtikið var rentan tí at kalla óbroytt í farnu viku. 10-ára rentan liggur í løguni á 3,25%. Eftir orðini hjá Trichet er væl hugsandi, at rentan kann lækka nakað hesa vikuna.

## Inntøkuvæntanir hjá virkjum

Í heimshøpi vænta virkir, at vøksturin í inntøkum (inntøkunum fyri partabrævið, eisini kallað EPS) verður 9%-14% í 2006, og tær broytingarnar í inntøkuvæntanunum frá virkjunum, ið hava verið, hava sum heild ikki verið neiligar. Hetta er áhugavert nú partabrøv kunnu keypast á áhugaverdum kursstigi. Saman við øðrum jaligum viðurskiftum talar nú nógv fyri, at partabrøv fara at standa seg væl í ár. Serliga metir Kaupthing, at eitt nú Evropisk partabrøv eru áhugaverd, nú evropiski búskapurin, eftir at hava ligið í dvala leingi, er um at koma seg aftur.

## Hesa vikuna

Millum áhugaverdu hendingarnar hesa vikuna eru kunngerðir av prísvakstrartølum úr USA og Evropa. Prísvøksturin er í andglettinum tí bæði amerikanski tjóðbankin, Fed, og Evropiski Miðbankin, ECB, í løtuni leggja stóran dent á prísvøksturin, tá gjørt verður av, um rentan skal hækkast. Lítil ivi er um, at Fed fer at hækka rentuna aftur 31. januar, tí verður tað serliga evropiska talið, ið verður áhugavert, tí ósemja er um nær ECB fer at hækka aftur. Verður hetta talið hægri enn vænta fara tí lánsbrævarentur at hækka.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 614,47 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 5,38 | 0,4% | ↑ |
| GBP | 1.092,05 | 0,5% | ↑ |
| NOK | 92,60 | -1,7% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,16 | 2,0% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 174,08 | 0,0% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 109,74 | -1,2% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 75,48 | 1,5% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*